# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

| | |
|---|---|
| **Dagfesting:** | 30.05.2024 kl. 17:00 |
| **Málnr.:** | |
| Nevndarlimir: | Per Martin Gregersen<br>Katrin Kjartansdóttir<br>Magnus Skoralíð<br>Marjun Andreasardóttir<br>Rúni Justinussen<br>Marita Klein Joensen<br>Petur Súni Jacobsen<br>Hjalti Dalheim<br>Hanna Jensen |
| Varalimir: | |
| Ikki møtt: | Petur Súni Jacobsen |
| Nevndarskrivari: | Erik Lervig |


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar** | | | |
| 25/24 | 24/00048-2 | Kloakkskipan í Norðragøtu | 2 |
| 26/24 | 24/00069-4 | Nýtt kapróðrarneyst á Tyrilsgrundina í Norðragøtu | 4 |
| 27/24 | 24/00124-10 | Umsókn um byggiloyvi til um/uppíbygging - matr. nr. 140 Syðrugøtu | 6 |
| 28/24 | 24/00294-3 | 24/00294 - Umsókn um eykajáttan, Blásastova. Frágreiðing og tilmæli | 7 |
| 29/24 | 24/00360-3 | Umsókn um marknaumskipan matr.68 og 72f í Norðragøtu | 9 |
| 30/24 | 24/00375-2 | Roknskapur 2023 - 24/00375 | 10 |
| 31/24 | 24/00278-3 | 24/00278 - Verdandi (2). Frágreiðing og tilmæli | 11 |

**Mál til viðgerðar**

## 25/24 Kloakkskipan í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 18.01.2024 | 1/24 | 24/00048-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.01.2024 | 1/24 | 24/00048-2 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.05.2024 | 17/24 | 24/00048-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | 28.05.2024 | 18/24 | 24/00048-2 |
| 5 Býráðið | 30.05.2024 | 25/24 | 24/00048-2 |

**Málslýsing:**

Allar kloakkleiðingar frá vegamótinum Tróndargøtu/við Ánna/Tollaksgøtu verða leiddar til pumpubrunnar á havnarlagnum og pumpaðar á sjógv í útláti sunnast í grótbrotinum.

Innari parturin av bygdini, tvs. frá vegamótinum Tróndargøtu/við Ánna og inneftir verða leidd til felags leiðing, sum liggur framvið ánni, og verður leidd á sjógv niðanfyri kirkjugarðin. Hettar útláti lýkur ikki treytirnar í spillvatnskunngerðini, um at øll útlát skulu leiðast út um brimgarðar v.m. við góðum vatnskifti. Søkt bleiv Umhvørvisstovuna í 2015 um undantak til hettar, og at kanningar skuldu gerast á hvørjum ári 5 ár um staðfestast kundi dálking av botninum í einum radiusi á 50 m frá útlátinum.

Ætlanin er, at gera ein brun til yvirrenning niðanfyri skrivstovuna hjá LUNA, og leggja leiðing gjøgnum Tollaksgøtu út til pumpubrunn omanfyri Fiskavirkið. Við hesari loysnini vil undir vanligum umstøðum, alt vatni verða pumpa út til útlát sunnast í grótbrotinum. Í áarføri fer yvirrenningin í ein brunn, sum síðan verður leidd til útláti niðanfyri kirjugarðin, hetta er tó bert yvirflatu vatn (regn).

Tá vatn minkar aftur verður alt vatni leitt út eftir havnarlagnum og víðari til útlát sunnast í grótbrotinum.

Sí Skjøl í málinum.

**Ískoyti 23.05.2024**

Fýra tilboð er komin uppá kloakkarbeiði í Norðragøtu. RTS hevði lægsta tilboði áljóðandi 1.594.175,- u/mvg. Játtaðir peningur er 1.600.000,- kr. og við óvæntaðum útreiðslum, eftirlit, trygging og kommunu mvg, verður samlaður kostnaðurin 1.940.000,- kr. fyri verkætlanina.
Mælt verður til, at eykajátta 340.000,- kr. til hesa verkætlan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Avsett eru 1.600.000,- kr.

| **Tilmæli** |
| --- |
| Umsitingin mælir til, at bjóða arbeiði út og at seta arbeiði í gongd, tá tilboð fyriliggja.<br><br>**Ískoyti 23.05.2024**<br>Mælt verður til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 18. januar 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 22. januar 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tlmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. maj 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 28. mai 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 30. mai 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini.

## 26/24 Nýtt kapróðrarneyst á Tyrilsgrundina í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 28.05.2024 | 43/24 | 24/00069-4 |
| 2 Vinnunevndin | 22.05.2024 | 4/24 | 24/00069-4 |
| 3 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.05.2024 | 18/24 | 24/00069-4 |
| 4 Fíggjarnevnd | 28.05.2024 | 19/24 | 24/00069-4 |
| 5 Býráðið | 30.05.2024 | 26/24 | 24/00069-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsitingin hevur fingið gjørt eitt nýtt uppskot til kappróðraneysti í Norðragøtu, í samband við nýggja staðsetingina, sí hjálagda uppskot.<br><br>Umframt hevur umsitingin hevur fingið eitt tilboð uppá kappróðraneystið. Í tilboðnum eru nakrar smáar tillagingar gjørdar í mun til verandi uppskot, fyri at lækka um kostnaðin, samlaði kostnaðurin við tillagingum, eftirlit, tryggingum og ráðgeving er umleið 11.000.000 kr.<br><br>Avsettar eru 4.000.000,- kr. og tað vantar umleið 7.000.000,- kr. til alla verkætlanina.<br><br>Kostnaðurin at innilokað bygningin er 4.000.000,- kr. og kann hetta gerast í ár, tó eru vindeygu í ovaru hæddini, úthurð við trappu inngongd og klæðingin av bygninginum ikki við. Verður avgerð tikin at seta hetta í verk, má írestandi pening játtast til komandi fíggjarár fyri at fáa bygningin lidnan.<br><br>Mælt verður til, at innilokað bygningin í ár og at seta írestandi pening av í 2025. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini. |

**Vinnunevndin 22. maj 2024**

Katrin og Marita mæla til, at inniloka bygningin í ár og játta írestandi pening yvir 2-3 ár.

Petur Súni tekur støðu á Býráðsfundinum.

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. maj 2024**
Marjun Andreasardóttir mælir til, at eykajátta írestandi pening fyri at fáa bygningin liðugt innilokaðan í ár.

Petur Súni Jacobsen tekur støðu á Býráðsfundinum.

**Mentanarnevndin 28. maj 2024**
Mentanarnevndin mælir til at bygningurin verður innilokaður í ár og at restin av útreiðslunum verða útgreinnaðar og játtaðar á komandi fíggjarætlanum.

**Fíggjarnevnd 28. mai 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini. Harumframt mælir fíggjarnevndin til at eykajáttan verður givin soleiðis at vindeygu og hurðar eru íroknað.

**Býráðið 30. mai 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

## 27/24 Umsókn um byggiloyvi til um/uppíbygging - matr. nr. 140 Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.05.2024 | 19/24 | 24/00124-10 |
| 2 Býráðið | 30.05.2024 | 27/24 | 24/00124-10 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn, um út- og umbygging av sethúsum á matr. nr. 140 í Syðrugøtu. Ætlanin er at dagføra verandi sethús og at hækka yvirtromina, umframt at gera eina uppíbygging omanfyri húsini.<br><br>Sethúsini liggja í B-øki sambært almennu byggisamtyktini, og um Eysturkommuna skal loyva hesum er neyðugt at geva frávik frá byggisamtyktini.<br><br>Kommunan hevur áður loyvt bygging í hesum økinum, ið líkist hesari.<br><br>Hoyring bleiv send út til grannar 2. mai og var freistin 14 dagar. Umsitingin hevur einki mótmæli móttikið frá grannunum.<br><br>Sí skjøl í málinum. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at geva frávik til hesa út- og umbygging. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. maj 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 30. mai 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

## 28/24 24/00294 - Umsókn um eykajáttan, Blásastova. Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 23.04.2024 | 41/24 | 24/00294-3 |
| 2 Mentanarnevndin | 28.05.2024 | 45/24 | 24/00294-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 28.05.2024 | 22/24 | 24/00294-3 |
| 4 Býráðið | 30.05.2024 | 28/24 | 24/00294-3 |

**Málslýsing:**

Á seinasta fundi (09.04.24) varð umbøn um útgjald av árligum stuðli à 150.000 kr. til Blásastovu viðgjørd.

Blásastova sendur ynski um eykajáttan uppá 100.000 kr. ella ynski um hækkan av árligum stuðli frá 150.000 kr upp í 250.000 kr.

Grundgevingin fyri hesum er, fjósið hjá Vilhelm er stormsikrað í 2023. ". Harumframt eru vit við í umleggingini til grønan hita saman við kommununi. Vit skulu harumframt gera vesi í kjallaranum hjá Ísaki. Hetta er ein gomul avtalað við Gøtu Kommunu, og er hendan ætlanin sera átrokandi at gjøgnunføra."

Tað at hava eitt livandi savn kostar til lønarútreiðslur, men ger eisini savnið til nakað serstakt.

---

Dagføring 28.05.24

Av tí, at broytingar í málinum 24/00010 eru íkomnar, er avtalan frá 05.02.24 millum Gøtu fornminnissavn og Eysturkommuna um, at Eysturkommuna skal lata eina hitaskipan til Blásastovu, ið eisini skal kunna brúkast í húsunum hjá Ísaki, tileinkis blivin.
Tilskil stendur hjá Ísaki nú uttan hita og hugsanin er, at henda eykajáttan kann verða brúkt til hetta endamál.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Peningurin er ikki tøkur í løtuni. Eykajáttan neyðug.

**Tilmæli**

Møguligt er at veita partvísan stuðul. Peningurin verður útgoldin, tá arbeiðið er gjørt.

**Mentanarnevndin 23. april 2024**
Málið er viðgjørt og tað verður arbeitt víðari við málinum.

**Mentanarnevndin 28. maj 2024**
Mentanarnevndin mælir til, at veita eykajáttan á 100.000 kr., sum skal brúkast til hitaskipan í húsunum hjá Ísaki.

**Fíggjarnevnd 28. mai 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini

**Býráðið 30. mai 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini og fíggjrnevndini.

## 29/24 Umsókn um marknaumskipan matr.68 og 72f í Norðragøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 23.05.2024 | 20/24 | 24/00360-3 |
| 2 Býráðið | 30.05.2024 | 29/24 | 24/00360-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 28.05.2024 | 20/24 | 24/00360-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur fingið áheitan frá ánarum á matr. nr. 68 í Norðragøtu um marknaðarumskipan millum matr. nr. 72f og 68 í Norðragøtu.<br><br>Við at fremja marknaðarumskipanina fær matr. nr. 68 eina innkoyring í er gjørd og kommunan fær rætta uppá markalinju fram við vegnum matr. nr. d.<br><br>Eysturkommuna letur áleið 45 fermetrar til matr. nr. 68 og vegurin matr. nr. d fær áleið 6 fermetrar frá matr. nr. 68.<br><br>Talan er um gamalt mál ið var samtykt í Gøtu kommunu 08.06.1999 (máls nr. 060/99) og varð tá samtykt, men ongantíð blivið framt. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| 5000 – 10.000 kr. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til, at samtykja marknaðarumskipanina sum omanfyri nevnt. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 23. maj 2024**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 28. mai 2024**
Fíggjarnevndin mælkir til at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini

**Býráðið 30. mai 2024**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini og fíggjarnevndini

Eysturkommuna

## 30/24 Roknskapur 2023 - 24/00375

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 28.05.2024 | 25/24 | 24/00375-2 |
| 2 Býráðið | 30.05.2024 | 30/24 | 24/00375-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Víst verður til fyriliggjandi roknskap frá grannskoðaranum.<br><br>Samlaðu inntøkurnar eru 146,9 mió. og rakstrarútreiðlurnar eru 108,3 mió. Íløgurnar í 2023 vóru 37,9 mió. og RLÚ úrslitið var -1,4 mió.<br><br>Rentuútreiðslurnar vóru 1,8 mió., og útreiðlurnar til rentustuðul vóru 2,4 mió. Avdráttirnri vóru 8,7 mió., men í 2023 var eitt lán á 15 mió. upptikið so lagnfreistaða skuldin hækkaði við 6,3 mió.<br><br>Nettoskuldin við árslok 2023 var 44 mió. sum er 30% av eini álíking. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Fíggjarnevnd 28. mai 2024**
Fíggjarnevndin mælir til at góðkenna fyriliggjandi roknskap.

**Býráðið 30. mai 2024**
Roknskapurin einmælt góðkendur.

# 31/24 24/00278 - Verdandi (2). Frágreiðing og tilmæli

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 09.04.2024 | 24/24 | 24/00278-3 |
| 2 Mentanarnevndin | | | 24/00278-3 |
| 2 Mentanarnevndin | 28.05.2024 | 46/24 | 24/00278-3 |
| 3 Fíggjarnevnd | 28.05.2024 | 23/24 | 24/00278-3 |
| 4 Býráðið | 30.05.2024 | 31/24 | 24/00278-3 |

**Málslýsing:**

Talan er um umsókn um stuðul til ein film um Verdandi, sum gekk burtur í 1944 við 14 monnum. Søgan er í høvuðsheitum frásøgnin í bókini "Havið tók teir" um Verdandi.

Filmurin er sum so fiktión, men hann er bygdur yvir umrøddu hending og søguna um eina av einkjunum, Simonu Petersen í Syðrugøtu, og hvussu hon kláraði seg einsamøll við tveimum smáum døtrum. Hetta gjørdi hon fyrst og fremst við at binda skipstroyggjur o.a. fyri ta fyritøkuna, sum førdi til Tøtingarvirki.

Tað verður týðiliga víst á, at ein stórur partur av filminum gongur fyri seg í Syðrugøtu og at "The grand will be reinvested in the local community".
Síðan seinastu umsókn er serliga tað hent, at manuskriptið nú er skrivað á føroyskum (síggj viðfestar fílur) og at rithøvundur og leikstjóri, Dagmar Knöpfel, er farin undir at læra seg føroyskt.

Tey trý høvuðsfólkini hava verið í Føroyum fleiri ferðir í seinastuni og hava eisini verið á óformella vitjan í býráðshúsinum tvær ferðir.

Hvar skal filmurin vísast: "The film will be shown on German TV broadcaster BR, SR as well as ARTE. We also collaborate with the Faroese television KVF. The film will be released in cinemas in German speaking territories, Denmark and other European countries and of course premier on the Faroes. We plan to submit the film to international A-film festivals like Locarno, Berlinale or Cannes. This means Gøta will be seen in cinemas as well as on TV all over Europe. Thus, this film will go a long way in promoting tourism on the Faroes. We will showcase the islands' spectacular nature and breathtaking views, as well as the area of Gøta."

NB: Sama verkætlan (men ikki sama umsókn) fekk í fjør vár stuðul frá satspuljuni Filmslist uppá 100.000 kr. Í teirri umsókn vóru 370.000 kr umbidnar.

Umbiðin upphædd: 300.000 kr

---

Dagføring 28.05.24
21.05. var fundur hildin við fólkunum aftanfyri Verdandi verkætlanina. Til staðar á fundinum vóru HJ og AJ. Fundurin varð hildin fyri at fáa eitt betur yvirblikk yvir, hvussu langt verkætlanin er komin og fyri at síggja fólkini aftanfyri andlit til andlit.

| |
|---|
| Á fundinum varð forklárað og umrøtt, hvussu langt verkætlanin er komin, hvat seinasta játtanin frá komununi (100 t.kr. ) varð brúkt til og hvussu nógv restar í, áðrenn verkætlanin verður til veruleika. Tað sum restar í er 1 mió. kr.<br><br>Afturat hesum varð umrøtt, hvat ein møguligur stuðul kan brúkast til og hvussu Eysturkommuna kann hjálpa til við innivist, mati etc. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2024 eru 600.000 kr. settar av til rakstrarkonto 522, "Stuðul til mentan". Herav eru d.d. 307.700 kr. tøkar. Eingin peningur er oyramerktur til hetta endamálið. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til at ganga umsóknini (partvíst) á møti |

**Mentanarnevndin 28. maj 2024**
Mentanarnevndin mælir til at ganga umsóknini á møti.

**Fíggjarnevnd 28. mai 2024**
Per Martin Gregersen og Hjalti Dalheim mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanrnevndini at veita stuðul á 100 t.kr. Magnus Skoralíð mælir frá at veita stuðul.

**Býráðið 30. mai 2024**
Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá meirlutanum í fíggjarnevndini.

**Atkvøður fyri:**
Per Martin Gregersen, Hjalti Dalheim, Hanna Jensen, Marjun Andreasardóttir, Marita Klein Joensen, Rúni Justinussen, Katrin Kjartansdóttir

**Atkvøður ímóti:**
Magnus Skoralíð

fundurin lokin kl. 18.30

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen